# Finna bestu loysnina fyri Føroyar



*Formaðurin í 21-manna stóru Føroyanevndini hjá danska fólkatinginum, Pia Larsen, heldur tað verða umráðandi, at føroyingar geva sær góðar stundir at loysa trupulleikan við betur marknaðaratgongd.*
*Mynd: Bárður Lydersen*

**Føroyanevndin hjá danska fólkatinginum vil ikki blanda seg uppí ætlaða føroyska limaskapin í EFTA, men nevndin vil fegin hjálpa til í strembanini eftir at tryggja føroyingum best møguligu marknaðaratgongdina**

HANDILSAVTALUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eitt av málunum, sum uttanlandsnevndin hjá Føroya Løgtingi og Føroyanevndin hjá Fólkatinginum, hava viðgjørt í vikuni, nú danska nevndin hevur vitjað her á landið, er spurningurin um betri marknaðaratgongd fyri føroyskar vørur.

**Tørvur er á tí**

Bæði Pia Larsen úr Venstre, formaður í Føroyanevndini hjá Fólkatinginum, og Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, eru av teirri áskoðan, at tað er umráðandi at geva sær stundir at finna best møguligu loysnina fyri Føroyar, tá ið tað snýr seg um limaskap í handilsfelagsskapum og um nýggjar handilsavtalur.

- Høvuðsendamálið er at skaffa føroyingum betur atgongd til marknaðir ymsastaðnis í heiminum, og um tað er við einum EFTA-limaskapi ella við øktum samstarvi við ES, tað noyðast vit at finna út av, sigur Pia Larsen.

Fólkatingslimurin vísir á, at eisini danski forsætismálaráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, á ríkisfundinum í Leynum herfyri, legði dent á, at danir vilja hjálpa føroyingum í arbeiðinum við at fáa betur marknaðaratgongd. Pia Larsen sigur eisini, at eingin ivi er um, at føroyingar hava stóran tørv á at fáa nakrar betur handilsavtalur, ið kunnu verða føroyska útflutninginum at frama.

Eisini Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevndini, er av teirri sannføring, at tað er neyðugt hjá føroyingum at gera gjøllar kanningar, áðrenn teir taka endaliga støðu til ein møguligan EFTA-limaskap.

- Vit noyðast at kanna, hvat er best fyri Føroyar, og hvussu sleppa framat teimum ymisku marknaðunum. EFTA er ein møguleiki, men tað er eingin ivi um, at ES við øllum sínum nýggju limalondum er ein risamarknaður, og at hesin marknaður er avgjørt verdur at kanna nærri, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum.

# Skulu sjálvi leggja framtíðina tilrættis

**Boðskapurin frá Føroyanevndini hjá Fólkatinginum er greiður. Tað eru føroyingar sjálvir, ið skulu leggja framtíðina hjá Føroyum tilrættis, og ikki danska stjórnin í Keypmannahavn, sum tað annars hevur verið fyrr**

POLITISK VITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Pia Larsen og Johan Dahl á tíðindafundinum í Løgtinginum hósmorgunin. Pia Larsen sigur, at tað eru fyrst og fremst føroyingar, ið skulu leggja framtíðina hjá Føroyum til rættis og ikki danska stjórnin, soleiðis sum tað annars hevur verið.*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Týsdagin kom Føroyanevndin til landið, og sama dag hevði nevndin fund við Jóannes Eidesgaard, løgmann, sum millum annað greiddi nevndini frá visjón 2015 ætlanunum hjá landsstýrinum.

Nevndin hevur eisini ferðast norðan fyri á vitjanini, og sambært formanninum í nevndini, Piu Larsen úr Venstre, er væl komið burturúr.

**Umrøtt fíggjar-, vinnu- og orkupolitikk**

Danska nevndin vitjaði mikudagin í Norðoyggjum, har millum annað var heilsað upp á Klaksvíkar Býráð. Hósmorgunin var tíðindafundur í løgtinginum, og seinnapartin hósdagin var kósin aftur sett móti Keypmannahavn.

Á vitjanini hevur nevndin fingið frágreiðingar um nógv ymisk viðurskifti, og serliga hevur dentur verið lagdur á eitt nú fíggjarpolitikk, vinnupolitikk og orkupolitikk. Uttanlandsnevndin hjá løgtinginum hevur havt fund við Føroyanevndina, og tá hevur serliga nógv verið gjørt burtur úr at greiða frá trupulleikunum hjá føroysku fiskivinnuni á landi og sjógvi, og serligur dentur hevur verið lagdur á trupulleikarnar hjá fiskiflotanum.

Johan Dahl, formaður í uttanlandsnevndini, sigur, at umframt fiskivinnuna hevur nógv verð tosað um føroyska útflutningin, og teir trupulleikar, ið føroyska vinnan hevur við at koma inn á ymiskar marknaðir. Í hesum sambandi hevur verið tosað um møguligan føroyskan EFTA-limaskap og økt samstarv við ES, soleiðis sum greitt verður frá aðrastaðnis her á síðuni.

Pia Larsen sigur tó, at sjálvt um danir fegnir vilja hjálpa føroyingum í ymiskum málum, so er tað mest umráðandi, at føroyingar sjálvir, ið skulu leggja framtíðina til rættis, og ikki danska stjórnin úr Keypmannahavn, soleiðis sum tað annars hevur verið, sigur Pia Larsen.

## Ferðavinnan skal geva meiri

Á vitjanini hjá Føroyanevndini hjá Fólkatinginum í Føroyum í vikuni hava limirnir í nevndini havt høvi til eisini at uppliva Føroyar sum ferðamál, og formaðurin í nevndini, Pia Larsen, heldur, at føroyingar eiga at fáa meiri burtur úr júst ferðavinnuni.

- Vit hava við egnum eygum sæð, hvussu nógvir møguleikar liggja í ferðavinnuni í Føroyum við nógvum ríkum náttúruupplivingum, og við hesum í huga eru vit sannførd um, at tað eigur at bera til hjá føroyingum at fáa meiri burtur úr júst ferðavinnuni. Tit hava eina gávu frá Várharra í tykkara náttúru, og eingin ivi er um, at tað kann gagnnýtast betur, sigur Pia Larsen.
*tn*

## Suðuroyggin næstu ferð

Á tíðinadafundi í sambandi við vitjanina hjá Føroyanevndini hjá fólkatinginum, segði Pia Larsen, formaður í nevndini, at nevndin var sera fegin um vitjanina, og at nú høvdu tey bert eitt ynski í sambandi við vitjanina um tvey ár, og at tað var at sleppa at vitja í Suðuroy, tí har høvdu tey ikki verið enn.

Hesari áheitan var Johan Dahl skjótur at lofta, og hann bað teimum beinan vegin vælkomnum til Suðuroyar næstu ferð, ið tey vitja í Føroyum.
*tn*